## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og sirm ella mjørki av og á. Seint um kvøldið regn. Hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið mikudagin:**
Fyrrapartin stívt andøvsgul upp í hvassan vind av vestri, seinnapartin hækkar hann upp í útnyrðing. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 5 og 8 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Hvassur vindur ella skrið av útnyrðingi og norði og kavaælingur, men onkur sólglotti. Hitalagið millum frostmarkið og ÷3 stig.

**Veðrið fríggjadagin og leygardagin:**
Fríggjadagin upp í hvassan vind av norði og kavaælingur, men leygardagin minni vindur og yvirhøvur turt. Hitalagið millum ÷3 og +1 stig.

# »Tillukku góða Annika!«

**TÓNLEIKUR**
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*



*Annika Hoydal slapp ikki av aftur pallinum leygardagin, fyrr hon hevði fingið bæði føðingardagssang frá øllum børnunum og eina vakra føðingardagsgávu frá tónleikararnum*

Aldurin hevur ongan týdning – hvørki á børnunum, sangunum ella á Anniku Hoydal. Tað var hugnaliga familjukonsertin "Til børnini hjá børnunum frá Anniku Hoydal" á Gamla Meiarínum leygardagin eitt stuttligt dømi um.

Børn í øllum aldri høvdu leitað sær á konsertina, har Annika og tónleikararnir Eyðun, Jógvan og Kaj sungu teir flestu av teimum gomlu, kendu barnasangunum, sum tey vaksnu hava gingið og murrað, so langt vit øll minnast. Og tá Annika sang Rottur gnaga, Blunda, blunda, Eg fór mær til Gjáar og allar hinar, vóru tað ikki bara tey vaksnu børnini, sum sungu við. Ivaleyst hava tey eisini sungið hesar sangirnar fyri teirra børnum, tí eisini tey kendu bæði orð og løg.

Annika sang eisini fleiri av sangunum av nýggju fløguni "Til børnini hjá børnunum", sum kom út í síðstu viku. Nýggju sangirnir eru ikki so kendir enn, men tað verða teir uttan iva, tí børnini hjá børnunum sungu við av fullum huga. Og hvør veit, kanska fara tey eisini at læra foreldrini at murra við sanginum um Grátt undir steini, Mykjufluguna í Mykinesi og allar hinar.

Hetta var eisini ein heilt serligur dagur hjá Anniku, tí hon fylti jú 60 ár leygardagin. Sum vera man slapp hon ikki av pallinum aftur, fyrr enn øll høvdu sungið "Tillukku góða Annika" og tónleikararnir høvdu givið henni eina gávu - eitt fint føroyskt turriklæð, sum Annika spent koyrdi um hálsin beinanvegin.

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | -4 |
| Nuuk | -- |
| Qaqortoq | -4 |
| Ammassalik | -1 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 2 |
| Seyðisfjørður | 6 |
| Tórshavn | 9 |
| Lerwick | 10 |
| Aberdeen | 7 |
| London | 3 |
| Tromsø | 0 |
| Bergen | 4 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 1 |
| Keypmannah. | 7 |
| Helsinki | -2 |
| Moskva | 1 |
| Berlin | 4 |
| Warzawa | 0 |
| Kiev | -3 |
| Bukarest | 1 |
| Paris | 0 |
| Madrid | 12 |
| Róm | -- |
| Malorca | 18 |
| Athen | -- |
| Malta | 17 |
| Tunis | 17 |
| Beijing | 8 |
| New Dehli | 25 |
| Bangkok | 29 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | -- |
| New York | 13 |
| Miami | 26 |
| Los Angeles | 26 |
| Meksikobýur | 19 |
| Panama | -- |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 31 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt hátrýst, 1035 hPa. yvir Írska Havinum stendur mestsum í stað og mennist. Ein hitabrúgv við Føroyar fer í landnyrðing.




**Í dag:**
Hátrýstið yvir Onglandi stendur mestsum í stað. Kuldabrúgvin við Føroyar fer spakuliga eystureftir.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 18/11 kl. 06[00]– 19/11. 06[00]. Hitin í gjár: 3,8°
Minsti hiti máldur í nov.: - 7,2° - Mesti hiti máldur í nov.: 12,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 18/11 kl. 06[00]– 19/11 kl. 06[00]
Avfallið higartil í november: 131,4 mm






## VESTFALLSKYRRINDI

23. november longst frá jørðini — Mánin

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 21. Nov. | 10.38 | 23.00 | 09.38 | 22.00 | 09.53 | 22.15 | 00.13 | 12.38 | 01.13 | 13.38 | 08.53 | 21.15 | 07.53 | 20.15 | 10.53 | 23.15 | 11.53 | - | 10.23 | 22.45 | 11.38 | - |
| 22. Nov. | 11.22 | 23.57 | 10.22 | 22.57 | 10.37 | 23.12 | 01.00 | 13.22 | 02.00 | 14.22 | 09.37 | 22.12 | 08.37 | 21.12 | 11.37 | - | 00.15 | 12.37 | 11.07 | 23.42 | 00.00 | 12.22 |
| 23. Nov. | - | 12.32 | 11.32 | - | 11.47 | - | 01.57 | 14.32 | 02.57 | 15.32 | 10.47 | 23.18 | 09.47 | 22.18 | 00.12 | 12.47 | 01.12 | 13.47 | - | 12.17 | 00.57 | 13.32 |
| 24. Nov. | 01.03 | 13.35 | 00.03 | 12.35 | 00.18 | 12.50 | 03.03 | 15.35 | 04.03 | 16.35 | 11.50 | - | 10.50 | 23.08 | 01.18 | 13.50 | 02.18 | 14.50 | 00.48 | 13.20 | 02.03 | 14.35 |
| 25. Nov. | 01.53 | 14.12 | 00.53 | 13.12 | 01.08 | 13.27 | 03.53 | 16.12 | 04.53 | 17.12 | 00.08 | 12.27 | 11.27 | 23.44 | 02.08 | 14.27 | 03.08 | 15.27 | 01.38 | 13.57 | 02.53 | 15.12 |

Kelda. Álmanakkin 2005

5 707265 100029 >